# Terry skal leggjast undir skurð

Liðformaðurin hjá Chelsea, John Terry, sum hevur verið illa plagaður av skaðum seinasta árið, skal nú leggjast undir skurð. Hesaferð er talan um skaða í knænum. Terry kann vænta at vera uttanfyri vøllin í øllum førum næsta mánaðin, og tað merkir, at hann eftir øllum at døma ikki verður við í týdningarmikla EM-dystinum hjá Onglandi móti Kroatia. Men steðgurin hjá Terry kemur kanska væl við hóast alt, tí nú kann hann eisini lata brotið í kjálkabeinium lekjast, áðrenn hann fer at spæla fleiri dystir



# Claus hugdi eftir javnleiki

Claus Bech Jørgensen var eykamaður, men kom ongantíð á vøllin í dystinum hjá Blackpool í triðbestu ensku fótbóltsdeildini leygardagin. Blackpool spældi á heimavølli ímóti Crystal Palace, og liðini gjørdu eitt mál í part. Crystal Palace legði seg á odda beint fyri tíman, og tíggju minuttir seinni javnaði Blackpool. Liðið hjá Claus Bech Jørgensen liggur sum nummar 16 av 24 liðum í deildini og hevur fingið 13 stig í 11 dystum.

## Vit vóru tolnir

16 ára gamli Høgni Midjord byrjaði fyri fyrstu ferð inni í Formuladeildini, og hóast hann er so ungur sum fáur Formulaleikari, so sær hann hetta ikki sum ein trupulleika.

- Nei, tað er als eingin trupulleiki. Nú eri eg ikki vanur við at spæla í Formuladeildini, men tað kemur. Kropsliga haldi eg heldur ikki, tað er nakar trupulleiki, sigur ungi áleyparin.

Vit spurdu hann, hví teir vóru omaná, tá ið avtornaði.

- Vit bardust væl allan dystin, og vit halda fokus eins leingi. Vit vóru tolnir, sigur Høgni Midjord hjá B71.

## Spælið hekk ikki saman

Rógvi Poulsen, sum um góða viku verður 18 ár, hevur eftir summarsteðgin veruliga gjørt vart við seg á AB-liðnum, og saman við Pæturi Jørgensen var hann mest sjónligur maður ímóti B71. Rógvi heldur ymsar orsøkir vera til tapið.

- Vit manglaðu nógvar mans og spældu við einum nýggjum liði. Spælið hekk ikki saman, og tað vísur seg, at vit alt ov ofta tapa tepurt. Soleiðis er at vera botnlið, sigur Rógvi.

Vit spurdu hann, hvat AB hevur lært av hesum kappingarárinum í Formuladeildini.

- Leikferðin og støðið sum heilt er nógv hægri. Ikki bara fyri leikarar, men eisini fyri nevndina. Næstu ferð vit eru í Formuladeildini haldi eg, at vit skulu satsa frá byrjan av. Í ár satsaði nevndin ov nógv ímóti endanum av kappingini, sigur Rógvi Poulsen.



*B71 vann aftur hesaferð á AB, og harvið staðfestu sandoyingar, at teir hava klárað seg betur enn AB eftir uppflytingina í fjør*

*Mynd: Pætur Albinus*

B71-AB 0-1 (0-0):

# B71 hevur takið á AB

**B71 hevur vunnið allar tríggjar dystirnar ímóti AB, sum teir fluttu upp saman við í fjør. B71 kann røkka miðjuni í Formuladeildini, meðan AB má niður aftur í 1. deild**

FORMULADEILDIN
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

*AB*

*B71*

Sandoyingar staðfestu sunnudagin, at teir hava klára seg betur enn AB, síðani liðini bæði fluttu upp í Formuladeildina seinasta kappingarár. Tað er langt síðani avgjørt, at AB fer niður aftur, og B71 kann framvegis røkka fram á miðjuni á Formuladeildini.

Tað vóru tvey lið við nógvum óroyndum leikarum, sum møttust á Argjum í gjár. Serliga var tað AB, sum mátti vera nógvar leikarar fyri uttan. Allan Mørkøre, Johan Ellingsgaard, Jónas Tór Næs, Magnus Poulsen og Evrard Blé vóru ikki við vegna leikbann, skaðar og av øðrum grundum.

Hjá B71 vóru Eirikur Poulsen og Clayton Soares skaddir, og hetta gav pláss til tann bert 16 ára gamla Høgna Midjord í álopinum.

### Vindurin darvaði

Fyrstu løtuna av dystinum var sera nógvur vindur, og hesa løtuna kappaðust liðini um, hvør stóð seg best í vindinum. Lítið og einki skipað spæl var at síggja, men tá vindurin so við og við tók av, hildu liðini fram við at spæla heldur oskipað. B71 hevði tó munin, og sat meira á spælinum.

Í verjustøðum trektu liðini seg langt aftur á vøllin, og hetta førdi við sær, at liðini ongantíð komu afturum verjuna hjá mótstøðuliðinum. Tí royndust liðini við fleiri langskotum, og serliga var tað B71, sum royndi seg við hesum. Uttan iva tí, at B71 hevði nógvan viðvind.

Tættast einum máli var B71 fimm minuttir undan steðginum, tá ið Vellington stútaði eitt innlegg frá Símini Hansen. 18 ára gamli Heðin Stenberg í AB-málinum stórbjargaði royndini og tryggjaði AB eina hálvleiksstøðu áljóðandi 0-0.

### B71 gjørdi bart

Seinni hálvleikur var munandi áhugaverdari enn fyrri hálvleikur. Vindurin var nú minkaður so mikið, at leikast kundi uttan trupulleikar. Bæði liðini stóðu sera tøtt á vøllinum, og fríspælingar og stórir møguleikar vóru ikki at finna.

B71 var tó framvegis omaná, og eftir einum tíma gav tað úrslit. Símin Hansen fekk sum tann fyrsti í dystinum gott pláss í høgru síðu, og hann stevndi málrættað eftir málinum. Hann lobbaði bóltin yvir AB-málverjan, og inni á málstrikuni var ein AB-verjuleikari um at fáa bóltin burtur, men í somu løtu kom Símin aftur framvið og skeyt bóltin í netið til 1-0.

Síðsta korterið kom meira lív í, og samstundis við at liðini fingu meira pláss at spæla á, fór at ganga á bæði mál. Einki lið megnaði tó at fáa mál, og B71 vann sær tískil øll stigini heim til Sands.